# Kanningarstjóri lýsa hurðamálið í Tinganesi

KÁRI P. HØJGAARD
løgtingsmaður



Við hesum verður soljóðandi skriv sent løgtingsformanninum við áheitan um at lata landssýrismálanevndini málið sum skjótast:

Sjálvstýrisflokkurin heitir á landsstýrismálanevndina um at seta setur kanningarstjóra eftir § 38, stk. 2 í stýrisskipanarlógini. Biðið verður um, nevndin tryggjar at arbeiðsetningurin verður nóg breiður, so eisini verður kannað, hvørt løgmaður hevur forsømt sínar skyldur at samskipa landsstýrið eftir § 33, stk. 2 í Stýrisskipanarlógini og áhaldandi at kunna Føroya Løgting um støðu landsins, samráðingar við onnur lond og ikki minst skylduna at tilbúgva landsins fíggjarlóg.

Sjálvstýrisflokkurin var til reiðar at samstarva við CHE-samgonguna uttan at krevja nakran landsstýrissess ella seta fram nakað annað avgjørt krav, uttan at fáa í lag samráðingar um týðandi mál og átøk. Eftir nakrar heilt fáar smávegis kunnandi fundir er greitt, at landsstýrið, annað árið á rað, ikki hevur nakað uppskot um løgtingsfíggjarlóg klárt til ásetta tíð.

Tekur landsstýrismálanevndin ikki alt fyri eitt upp málið og setur kanningarstjóra at kanna embætisførsluna hjá løgmanni og teimum landsstýrismonnum, ið sitið hava við uttanríkis- og fíggjarmálum, fer Sjálvstýrisflokkurin at taka stig til at fáa løgtingsformannin at kalla Føroya Løgting saman til fundar at umrøða støðuna.

# Tjóðveldið tekur undir við, at kanningarstjóri verður settur

**Tíðindaskriv**

Tjóðveldi tekur undir við Sjálvstýrisflokkinum, sum hevur heitt á tingformannin um at seta ein kanningarstjóra at kanna tað sonevnda skrivstovumálið í Tinganesi.

Ákærurnar um "Watergate", innbrot og valdsmisnýtslu í Tinganesi hava fullkomiliga máað støðið undan øllum áliti á politisku skipanina.

Vit kunnu ikki bjóða fólki at hesar ákærur hanga í leysum lofti, í tí eigur ein kanningarstjóri at verða settur at lýsa málið.

Hóskandi politiskar og/ella rættarligar avleiðingar eiga sjálvsagt at verða tiknar, tá niðurstøða kanningarstjórans fyriliggur.

Tjóðveldi fegnast um, at eisini løgmaður í Útvarpi Føroya 21. september segði seg ynskja, at málið verður lýst til fulnar.

Tjóðveldi tekur hesa fráboðan sum tekin um, at løgmaður eisini tekur undir við, at hóskandi avleiðingar verða tiknar, tá niðurstøða kanningarstjórans fyriliggur.

Á Føroya Løgtingi 21. september 2008

**Tjóðveldi**

# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**39. partur**

Tíð heidningana ella samkomutíðin.

Tá ið Harrin sendi lærisveinarnar út, segði hann við teir, at teir skuldu læra tey, sum komu til trúgv. Teir ellivu, sum stóðu har, fingu eina týdningarmikla uppgávu. Paulus, sum seinni bleiv umvendur, fekk eitt serligt kall, sum ápostul eisini og bleiv soleiðis hin tólvti. Hann sigur soleiðis í Ef. 2. kap. versini 19-20:

"Tit eru tí ikki longur fremmand og útlendingar; nei, tit eru samborgarar hinna heilagra og húsfólk Guds, tit, sum uppbygd eru á grundvølli ápostlanna og profetanna - og hornsteinurin er Kristus Jesus sjálvur."

Hetta er grundvøllurin, hin sanni kristni stendur á. Ápostlana læra og profetarnir, og hornsteinurin er Kristus Jesus. Nýggja og gamla testamentið, tað er tað, vit byggja á. Vit kunnu her taka fram tvey skriftbrot, annað frá Pæturi og hitt frá Paulusi. Pætur sigur soleiðis:

"Tí ikki var tað snilt upphugsaðum ævintýrum, vit gingu eftir, táið vit kunngjørdu tykkum kraft og komu Harra okkara Jesu Krists; nei, vit vóru eygnavitni til hátign Hansara - táið Hann fekk heiður og dýrd frá Gudi Faðir, og slík rødd ljóðaði til Hansara frá hini hátignarligu dýrd: "Hesin er Sonur Mín, hin elskaði, sum Eg havi tokka til."

Hesa rødd hoyrdu vit ljóða av Himli, táið vit vóru við Honum á hinum heilaga fjalli.

So mikið meiri staðfest hava vit hitt profetiska orðið, sum tit gera væl í at akta eftir - eins og eftir ljósi, ið skínur á myrkum staði - inntil lýsir av degi, og morgunstjørnan rísur í hjørtum tykkara." 2. Pætursbr. 1,16-19. Og Paulus sigur hetta:

"Paulus, tænari Jesu Krists, kallaður til ápostul, kosin at kunngera evangelium Guds, sum Hann frammanundan í heiløgum skriftum hevði lovað við profetum Sínum, um Son Hansara, sum eftir holdinum er føddur av ætt Dávids, og sum eftir Anda heilagleikans er við kraft prógvaður at vera Sonur Guds við uppreisn frá hinum deyðu - Jesus Kristus, Harra okkara.

Við Honum hava vit fingið náði og ápostlaembæti til at virka trúarlýdni millum øll heidningafólkini - navni Hansara til heiður;" Rómbr. 1,1-5.

So vit síggja, at ápostlarnir vóru kallaðir til ápostlaembæti, og Harrin hevði talað til teirra persónliga. Umframt tað bygdu teir á profetarnar í gamla testamenti.

**Framhald**

# Kvinnufelagið mælir til javnstøðu í landsstýrið

KVINNUFELAGIÐ Í HAVN

Kvinnufelagið í Havn heitir staðiliga á allar samráðandi flokkar um, at javnstøða verður í landsstýrinum.

Javnstøða millum menn og kvinnur hevur stóran týdning fyri trivnaðin í einum framkomnum samfelagi sum tí føroyska. Ikki minst, um vit ynskja at verða tikin fyri fult í norðurlendskum og evropeiskum samstarvi.

Vantandikvinnuumboðanin í føroyskum politikki forðar okkara landi, ið at hava eitt veruligt demokrati og tað krevur ein serligan vilja og politiskt áræði at koma hesum trupulleika til lívs.

Okkara vón er, at komandi samgonga tekur fult atlit til javnstøðuspurningin, tá fólk skulu finnast til landsstýrissessirnar. Tá allir floksformenn eru mannfólk, so krevur tað, at hesi mannfólk eisini taka javnstøðuspurningin í álvara, tá landsstýrisfólkini skulu setast, og tað er ongin orsøk til at hugsa at tað ikki finnast "best egnaðar" kvinnur í landi okkara, eins og tað finnast menn.

Vit í kvinnufelagnum í Havn eru, eins og flestu føroyingar, troyttar av politiskum ráðaloysi og óstabiliteti, og vit ivast ikki í, at skal føroyskur politikkur lyftast upp á eitt meira mentað og siðiligt støði, mugu kvinnurnar eisini sleppa at taka ábyrgd.

Seta flokkarnir sær fyri, at javnstøða skal vera á ovastu rók, eru vit sannførdar um, at hetta fer at føra til eitt betur politiskt umhvørvi í Føroyum, ið tekur atlit til bæði menn og kvinnur.

Við javnstøðukvøðu.

# Arbeiðsumstøðurnar hjá Djóraverndarfelagnum

JÓNA MORTENSEN



Ella rættari, tær manglandi arbeiðsumstøðurnar.

Eg eri fleiri ferð biðin um at koma í nevndina í Djórafelagnum, men havi borið meg undan, av teirri orsøk, at eg veit hvussu arbeiðsumstøðurnar eru har.

Onkur heldur kanska at tað er eitt sindur løgið at koma við hesum máli nú, júst sum politikkarnir royna at fá eina samgongu í lag. Men eg haldi absolut at hettar "forsømda mál" eigur at koma fram, nú vit hava eitt býraðsval fyri framman. So eg skrivi hettar við vón um, at eitt nýtt býráð fer at hava okkara bleytu vinir við, tá planlagt verður.

Minnist at eg sum smágenta plagdi at ganga á hurðina hjá Gurli Restorff við kettum, sum eg hevði funnið og sum eingin var góður við, ella eingin átti. Hon fekk altíð sama kerliga úttrykk í eyguni, tá hon sá hettar dýr, tók tað inn til sín, sjálvt um har var yvirfylt av ørðum heimleysum dýrum.

Hettar er næstan 50 ár síðani, og tá noyddust tey sum arbeiddu í Djórafelagnum at hava hesi ymisku dýrini, sum fólk komu við inni hjá sær sjálvum, tí tey høvdu onga staðir at hava tey.

Í dag er akkurát sama skil. Fólk vita um dýr sum ganga fyri vág og vind, men vilja ikki blanda seg uppí, tí allarhelst hanga tey sjálvi uppá dýrið. Eg havi tosað við eina damu í Djóraverndarfelagnum, hon segði mær, at meiningin er at gera eina innsamling, so tey kunnu keypa eitthvørt hús (sjálvandi krevst ikki nøkur luksusvilla) har tey kunnu hava tey innkomnu dýrini og skiftast um at passa tey.

Eg haldi ikki, at tað skuldi verið neyðugt at gjørt eina innsamling, tey skuldu fyri langari tíð síðani fingið eitt hús at verið í. Ein skal hugsa um at Djóraverndarfelagið er eitt felag har fólk arbeiða frívilliugt og eg má siga at eg taki hattin av fyri teimun, at tey blíva við undir tílíkum umstøðum.

Enn tann dag í dag verða hundar, ið verða upptiknir, læstir inni í einum lítlum húsi/fjósi úti í Havnardali, har standa teir í 3-4 dagar. Um so eingin spyr eftir teimun, so verða teir avlívaðir: Eg havi sjálv hoyrt ýlini frá teimum, og soleiðis hevur tað verið alt tað eg kann minnast. Til ketturnar hevur býráðið fellur, har ketturnar verða fangaðar í, hava tær einki chip í nakkanum, verða tær avlívaðar. Tað bleiv enntá víst í sjónvarpinum, har tey avlívaðu eina tama vakra kettu fyri opnum skermi, kalt og kyniskt.

Sjálvandi skal hattar broytast. Ikki bara við einum størri húsi til hundarnar at standa í hesat 3-4 dagarnar, men soleiðis at tá ein borgari finnur eitt dýr, ella veit um eitt dýr ið ongan góðan eigur, kann hann ringja til Djóraverndarfelagið, sum so kemur á staðið og avheintar dýrið og koyrir tað til húsið, sum tey hava. Har verður tað kannað av einum djóralækna og fær pleygu. Um so eingin spyr eftir dýrinum, roynir man at finna eitt heim til tað. Sum nú er mugu tey avlíva fleiri dýr, tí tað er ikki pláss fyri inni hjá privatum fólki at hýsa hesum dýrum.

Lesið Sosialin - so eru tit við